# Gunnar vann OL-teinin

**Sunnudagin var seinasta einstaklinga-kappingin í triathlon á skránni. Kappast varð á OL-teininum, sum svara til 1/4 triathlon**

TRIATHLON
*tíðindaskriv*





*Talan var um seinastu einstaklingakappingina á árinum, og lukkutíð var kalda høgætting tá ikki reiðiliga komin at høvuðsstaðnum, meðan kappast varð*
*Mynd: Jens Kr. Vang*

Kappingin var í Havn, og var byrjað við 1500 m svimjing í svimjihøllini.

Ikki óvæntað var Gudmundur Joensen fyrstur upp úr hylinum, sjálvt um hann svam 50 m longri enn teir 1500m, tí hann ikki legði merki til reyðu plátuna, sum vísir svimjaranum, at nú eru 50 m eftir. Hann var eisini fyrstur út á 40 km. súkkluteinin. Millum 3 og 4 min. seinni kom Gunnar Dahl Olsen úr hylinum, og 1 min. 38 sek. aftan á hann kom Evald Rasmussen. Báðir komu í senn út til súkklurnar og út á súkkluteinin, har Gunnar streyk avstað sum ein hvirluvindur. Evald rendi í fløskubrot á Hvítanesvegnum, men súkklaði tó spakuliga víðari, meðan hann bíðaði eftir einum bili við eyka hjólum. Tey fekk hann inni á Sundi, men tá var Andrass Joensen, sum hesaferð bæði svam og skifti skjótari enn vanligt, longu farin framvið við góðari ferð. Seinasti maðurin úr hylinum, Áslakur Nesá, skifti skjótt og súkklaði sína bestu tíð, og millum Kaldbaksbotn og Kaldbak yvirhálaði hann Evald, sum ikki hevði fingið gongd í aftur aftaná punkteringina.

Í Kaldbak fekk Gunnar eisini fatur í Gudmundi, sum annars hevði verið heilar 5 min. frammanfyri, tá súkklingin byrjaði. Áslakur át seg alt meira og meira inn á Andrass, og tá skift var til 10 km renning, vóru teir 4 min. Andrass hevði vunnið sær í svimjingini minkaðir til 38 sek. og stutt aftan á at byrjað var at renna, fór Áslakur framum, og kom á mál sum nr. 3. við síni best tíð nakrantíð. Tað sama gjørdi eisini Andrass. Gudmundur sum bleiv nr 2. hevur nú bara Gunnar Dahl Olsen og Eli Christiansen farmman fyri seg í triathlon.

Men høvuðspersónurin, skjótt 42 ára "gamli" Gunnar Dahl Olsen vann sítt áttanda FM-heitið, og var hetta eisini nýtt føroyskt met við tíðini 2.12.53.

Gamla metið átti Gunnar sjálvur, og var tíðin tá 2.13.45.

### 1/12 traithlon

Her vóru bara 4 íðkarar, 2 svimjarar og 2 rennarar. Ikki at undrast yvir, so vóru svimjararnir Mourits Danberg og Helena G Jacobsen fyrst úr hylinum og úr á súkkluteinin. Men tá farið var at renna endaði galið. Mourits rann skeivt og Helena fekk krampa og tí góvust bæði.

Hini bæði, Rannvá Djurholm og Holger Arnbjerg, brúkti eitt sindur longri tíð í svimjihylinum, men í súkklingini og renningini gekst væl.

Rannvá, sum hevur roynt triathlon nakrar ferðir, kom á mál við bestu tíð, og Holger, sum royndi seg fyrstu ferð, byrjaði varliga og setti so ferðina upp, og seinasta umfar á renniteininum rann hann 1 min. 15 sek skjótari enn fyrsta.

### Liðkapping eftir

Føroya Triathlon Felag skipar um tvær vikur fyri FM í sprint triathlon fyri lið, Har skulu ein svimjari, ein súkklari og ein rennari sláa seg saman og umboða eitt felag, fyritøku, áhugabólk ella familju.

Kappingin verður í Havn, og kappast verður í 750 metra svimjing, 20 km súkkling og 5 km renning.

Fyrst verður svomið í Svimjihøllini í Gundadali. Liðugur at svimja, rennur svimjarin út til súkklaran, og sendi hann avstað.

Súkklað verður frá Svimjihøllini til rundkoyringina við Skansan og aftur til rundkoyringina R.C. Effersøesgøta/Norðari Ringvegur 3 ferðir, og so oman til Skógrøkt Landsins.

Her verður skift til renning, og sendir súkklarin nú ein rennara avstað.

Runnið frá innkoyringini til Skógrøkt Landsins niðan eftir Hvítanesvegnum til vinstru eftir Skraddaragøtu, aftur til vinstru inn á gøtuna kring Skógrøktina og aftur til málið við Skógrøkt Landsins.

Runnið verður 6 ferðir runt.

Tilmelding á www. triathlon.fo

STUTT SAGT

## U17 dreingirnir tiknir út til EM



U17 fótbóltslandsliðið, sum skal verða við í EM-undankapping í Norðurírlandi, er nú tikið út. Landsliðsvenjararnir Pætur Clementsen og Finn Johannesen hava sent boð eftir hesum spælarum:

Hans Jørgensen, Erland Berg Danielsen SKÁLA, Sámal J. Djurhuus, Ási Dam FS Vágar '04, Heri Nesá, Viljormur Davidsen, Klæmint A. Olsen, Jóhan Símun Edmundson NSÍ, Rógvi S. Holm B36, Gunleif Olsen TB, Eli Simonsen, Páll Klettskarð, Andrias N. Ellingsgaard, Jógvan Isaksen KÍ, Erling Jacobsen GÍ, Heini Vatnsdal, Martin Tausen VB, Thomas J. Thomsen HB.

U17 landsliðið fer úr Føroyum týsdagin 17. oktober og skal spæla dystir ímóti Norðurírlandi, Sveis og Kypros. Dysturinir verða spældir í Belfast.

## Venjari segði upp í hálvleikinum

Sunnudagin spældi næstfremsta liðið í Sveis, Sion, steypadyst ímóti einum liði úr triðbestu deildini. Í hálvleikinum var Sion aftanfyri 1-0, og tað gjørdi argentinska venjaran hjá liðnum so illan, at hann segði upp – á staðnum! Nelson Clausen segði i hálvleikinum við spælararnar hjá sær, at hann gavst sum venjari, og so rýmdi hann. Spælararnir vóru kløkkir, men fóru á vøllin aftur og vendu dystinum til ein 3-1 sigur.

## Triathlon-úrslit

**OL-teinurin**

| Navn | Svimjing | skift | Súkkling | skift | Renning | Samlað |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Gunnar D. Olsen | 24.05 | 2.52 | 1.03.52 | 0.35 | 41.56 | 2.14.53 |
| Gudmundur Joensen | 20.44 | 2.06 | 1.14.54 | 0.12 | 41.16 | 2.19.12 |
| 3. Áslakkur Nesá | 31.07 | 1.43 | 1.08.51 | 0.31 | 43.02 | 2.25.14 |
| 4. Andrass Joensen | 27.18 | 1.41 | 1.12.20 | 0.31 | 45.04 | 2.26.54 |
| 5. Evald Rasmussen | 25.43 | 1.26 | 1.22.49 | 0.019 | 50.15 | 2.41.32 |

**1/12 triathlon**

| Navn | Svimjing | skift | Súkkling | skift | Renning | Samlað |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Rannvá Djurholm | 6.27 | 2.50 | 15.59 | 0.02 | 12.43 | 50.01 |
| Holger Arnbjerg | 8.44 | 3.06 | 18.59 | 0.11 | 16.29 | 58.31 |